LANDSVERKFRØÐINGURIN

KT FOLK

- verkfrøðingur, dátufrøðingur ella líkn.

Søkt verður eftir einum KT fólki til stovnin – til setan 1. mai ella skjótast gjørligt.

Arbeiðsuppgávur
Tann, ið settur verður, fer at taka lut í ymiskum edv-verkætlanum við tí endamáli at menna KT-tøknina á stovninum og verður við í rakstri og viðlíkahaldi av telduútbúnaðinum, ið fevnir um umsitingina av eini HP 9000 teldu, umframt viðlíkahald av pc'arum og ráðgeving, menning og útbúgving av starvsfólki.

Førleikakrøv
Sóknast verður eftir verkfrøðingi, dátufrøðingi ella líknandi. Umsøkjari við kunnleika til Unix, Windows, C og Oracle hevur fyrimun.

Setanartreytir
Løn og setanartreytir annars vera sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi yrkisfelag.

Umsóknir
Umsóknir við prógvum og møguligum ummælum verða at senda Landsverkfrøðinginum, Postboks 78, 110 Tórshavn og skulu verða skrivstovuni í hendi í seinasta lagi 26. februar 2001. Merkið brævbjálvan »KT fólk«.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast á tlf.311333, Torkil Zachariassen (e-postur: torkil@lv.fo).

Frá Suður-streymoyar Javnaðarfelag

Limafundur verður í hølunum Áarvegur 14 mikukvøldið kl. 20.00.

Til viðgerðar verður politiska støðan og fólkaatkvøðan í mei.

Løgtingsumboð verða við á fundinum.

Nevndin

Keypssamtøkan í Suðuroy

Keypssamtøkan í Suðuroy søkir fólk til fjølbroytt arbeiði í handlinum, fulla tíð, at byrja 1. mars ella eftir avtalu, løn samb. S & K.

Meira fæst at vita um setanartreytir hjá deildarleiðaranum, Gert Levisen, tlf. 371780.

Skrivlig umsókn skal sendast til

FK Suðuroy
Att: Gert Levisen
826 Trongisvágur

Ræst kjøt

Vit hava nakað av røstum føroyskum lambskjøti á goymslu.

Tykum kunnu bíleggja á telefon 422482 hjá MBM-kjøt.

FO-420 Hósvík
Tlf. 422482

Sosialurin
-tað loysir seg

TK Stovan

Byrja egið virki?

TK Stovan er óheft og veitir ókeypis ráðgeving til føroysku vinnuna.

Virkisráðgevar okkara eru til taks við vitan, royndum og amboðum. Vit skifta fegin orð um tínar menningarætlanir og veita góð ráð og holla vegleiðing.

31 73 66
www.tk.fo

TK Stovan
Niels Finsensgøta 37
FO-100 Tórshavn
Fax 319363
www.tk.fo

VILJI VITAN VØKSTUR

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. Sp/f 1227, **Sp/f Mallco, 700 Klaksvík.**

Viðtøkur broyttar: 01.12.2000.
Nevnd: Farin úr nevndini: Hans Josephen, Marknavegur, 700 Klaksvík (formaður), Andreas Djurhuus Josephsen, Marknavegur 700 Klaksvík og Ragnhild Djurhuus Josephsen, Marknavegur, 700 Klaksvík.
Grannskoðari: Farin frá sum grannskoðari: Karl Nielsen, 700 Klaksvík. Innkomin sum grannskoðari: P/F Føroyabók, Box 144, 700 Klaksvík.

Skráseting Føroya tann 5. februar 2001

Kristin Balle

Útleigan
av gólvmottum
Virkir, fyritøkur, stovnar. Við ella uttan LOGO. Royni í 14 dagar.
Vaskarí & Reingerð
tlf. 316300
gsm 211312
Við at leiga, hava tit ein trupulleika minni at hugsa um.

www.bilar.fo

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:

Skrásetingar-nr. P/F 277, **P/F Føniks, 100 Tórshavn.**

Viðtøkur broyttar: 17.07.2000.
Nýtt hjánavn: P/F Føroya Papp (P/F Føniks)

Skráseting Føroya tann 5. februar 2001

Kristin Balle

FÍGGJARMÁLASTÝRIÐ
Føroya Gjaldstova
Tróndagøta 39, Postbokse 2009, FO-165 Argir, Føroyar

Starv sum KT-leiðari á Føroya Gjaldstovu leyst at søkja

Eitt spennandi og avbjóðandi starv sum KT-leiðari á Føroya Gjaldstovu er leyst at søkja, nú KT-leiðarin ætlar at royna nýggjar avbjóðingar.

Gjaldstovan hevur seinastu árini arbeitt við at nýskipa almenna roknskaparverkið, og hevur tí lagt nógv arbeiði í at taka í nýtslu nýggjar EDV-skipanir, sum eru beinagrindin í búskaparstýring landsins.

Tað er sera umráðandi, at tað arbeiðið, ið er gjørt fyri at náa tað stigið, gjaldstovan er á í dag, kann halda fram í eini natúrligari tilgongd, og krevur hetta eina støðuga menning og viðlíkahald av Búskaparskipanum landsins. EDV-skipanirnar eru lívsæðrin í landsins búskaparstýring, og tí er KT-økið á gjaldstovuni so týdningarmikið.

Í starvinum sum KT-leiðari, hevur ein góðar møguleikar fyri persónligari menning, bæði fakliga og sum leiðari.

Starvið
Tú skalt vera leiðari av einari framtakshugaðari KT-deild, har tað í løtuni eru 6 fólk í starvi, við uppgávum sum fevna um gerð av yvirorðnaðum ætlanum fyri KT-økið, menningaruppgávur, ráðgeving og undirvísing á KT-økinum, umframt rakstur av einum fjøltáttaðum landsumfatandi EDV-kervi, ið fevnur um bæði miðsavnaðar og miðfirraðar ambætarar, við arbeiðsstøðum kring alt landið, ið byggir á Unix, Windows NT, Oracle og MS-SQL 7.

Ábyrgdarøkið
Starvið sum KT-leiðari er skipað sum deildarleiðarastarv beinleiðis undir stjóranum og er limur í almenna KT-forum sum umboð fyri Fíggjarmálastýrið.

KT-leiðarin hevur ábyrgdina av:
- Dagligu leiðsluni og fyrisitingini av EDV-deildini umframt netumsitingini í Fíggjarmálastýrinum.
- At tryggja eina áhaldandi persónliga og fakliga menning av starvsfólkunum á EDV-deildini.
- At orða KT-strategi og virkisætlanir hesum viðvíkjandi
- At menna EDV-trygd og EDV-politikk stovnsins og at góskutryggja KT-økið
- At reka, menna og viðlíkahalda EDV-skipanir stovnsins t.d. Fíggjarstýringarskipan landsins (FSL), ið er grundað á Oracle Applications fornitið. Nevnt kann verða, at ætlanir eru um brúk av internetinum til t.d. sjálv-(av)greiðslu.
- At menna og viðlíkahalda EDV-skjalfesting stovnsins, ið fevnir um skjalfesting av EDV-skipanum, tøkniliga bygnaðinum, avtalum við EDV-útvegarar o.t.
- At umsita KT-fíggjarætlan stovnsins, herundir samráðast og gera avtalur við EDV-útvegarar.
- KT-verkætlanum stovnsins, ið umframt projektleiðslu fevnir um kravfesting, undirvísing og innkoyring av nýggjum skipanum. Nevnt kann verða, at ein nýggj felags lønarskipan fyri allar almennar stovnar skal setast í verk í vár.
- Dagliga rakstrinum og umsjónin av tøknliga infrastrukturinum, sum m.a. fevnir um tvær HP9000, HP-UX 11.0 teldur, Windows NT net-ambætarar og umleið 250 teldur.

Førleiki
Tann, ið verður settur, skal helst hava hægri útbúgving og drúgvar royndir í beinleiðis arbeiði við fyrisitingarligum skipanum t.d. at hava forritað, gjørt kravfestingar ella hava verið verkætlanarleiðari í tillíkum arbeiði, sum krevst fyri at umsita nevndu ábyrgdarøki. Tað er ein fyrimunur at hava kunnleika til bókhald og roknskap.
EDV-deildin hevur eisini markamót til nógvar aktørar uttan fyri stovnin, tí er tað so umráðandi, at viðkomandi, ið verður settur, hevur góð samstarvsevnir, fyrisitingarligt hegni og skal kunna arbeiða sjálvstøðugt.
Vit rokna við, at tú hevur hollan kunnleika til KT yvirhøvur, og at tú hevur lætt við at seta teg inn í nýggj amboð innan KT-økið. Tað er avgjørt ein fyrimunur, um tú kennir til Oracle-amboðini, so sum Oracle Browser, Oracle Discoverer og Oracle Report Writer.

Lønarviðurskifti
Starvið verður lønt eftir sáttmála millum Føroya Landsstýri og viðkomandi yrkisfelag.

Umsóknir
Umsóknir við viðmælum og prógvum mugu vera Gjaldstovuni í hendi í seinasta lagi 12. februar 2001 og skulu sendast til:

Føroya Gjaldstova
P.O. Boks 2009
FO-165 Argir

Meir fæst at vita um starvið við at venda sær til stjóran, Leif Abrahamsen.

Gjaldstovan stendur fyri inn- og útgjaldingum landskassans og hevur um hendi ein part av almennu lønaravgreiðslunum. Ábyrgdarøkið kann natúrligt liðast sundur í hesar høvuðsuppgávur:
Landsins roknskaparhald - herundir menning, viðlíkahald og rakstur av landsins roknskaparskipan. Gjaldstovan førir í dag bókhald fyri tær flestu høvuðskonturnar á fíggjarlógini og heldur roknskap við ogn og skuld landskassans. Stovnurin umsitur eisini fleiri almenn lán og avgreiðir allar útgjaldingar úr landskassanum og ger landsroknskapin.
Lønarumsiting fevnir um eina menning, viðlíkahald og rakstur av eini miðsavnaðari skipan til útgjalding av almennum lønum. Verkætlanin byrjaði í 1999 og verður fyrsti partur av skipanini tikin í nýtslu til várs. Skipanin verður liðugt innført 2003.
Á Gjaldstovuni starvast í dag umleið 30 fólk. Stovnurin er skipaður í 4 deildir, sum eru roknskapardeild, lønardeild, fíggjardeild og EDV-deild. Deildarleiðarnir saman við stjóranum eru leiðsla stovnsins.

Kvívíkar Kommuna

Sambært løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954, við seinni broytingum, skal við hesum verða sagt frá, at endurskoðað »Byggisamtykt og Bygdaskipan 2000–2012 fyri Kvívíkar Kommunu«, verður lagt fram til almenna eftirskoðan á kommunuskrivstovuni frá 7. februar 2001 til 28. februar 2001, báðir dagar íroknaðir.

Møgulig mótmæli og broytingaruppskot skulu vera kommunustýrinum í hendi í seinasta lagi 7. mai 2001.

Skrivstovan er opin frá:

Mánadag:	10.00–13.00		
Týsdag:	10.00–12.00	13.00–16.00	
Mikudag:	10.00–12.00	13.00–16.00	18.00–20.00
Hósdag:	stongd		
Fríggjadag:	10.00–13.00		

Toska- og hýsu-kvota til sølu

Av samlaðu kvotuni hjá M/TR »Boðasteini« á innaru fiskidagaleið eru 38 tons av toski og 48 tons av hýsu til sølu. Neyðugt er ikki at keypa alt undir einum. Loyvi at fiska kvotuna gongur út 28/2-2001.

P/F Boðasteinur,
tlf. 444800

Frá Tvøroyrar býráð

Føstu fundardagar býráðsins í 2001 verða:
5. mars
2. apríl
7. mai
11. juni
3. september
1. oktober
5. november
3. desember

Allir fundirnir verða kl. 19.00 í býráðssalinum. Møguliga avlýstir fundir verða kunngjørdir í kunngerðartalvunum.

Tvøroyrar býráð

Sethús

úti í Grønlandi í Havn

Húsini standa í Krosslíð 9

Byggiár: 1967
Stødd: 70 m² í tveimum hæddum við innrættaðum kjallara.
Grundøki: 485 m²

til sølu um hóskandi boð fæst.

Tlf. 312802

M/T »Boðasteinur« til sølu

Um nóg høgt boð fæst, er ísfiskatrolarin M/TR »BOÐASTEINUR« til sølu.

M/TR »BOÐASTEINUR« er í bólki 1 Lemmatrolarar. Við skipinum fylgja øll fiskirættindi og allur fiskireiðskapur, ið umfatar vanlig botntrol, búrfiskatrol og Gloria flótitrol, umframt flóti- og botnstrolslemmar.

Áhugað biðjast venda sær til P/F Boðastein, tlf. 444800.

Kvívíkar Kommuna

Sambært L1. Nr. 87 frá 17.05.2000 um kommunustýri (kommunustýrislógin) § 13, skal við hesum verða kunngjørt, nær vanligu kommunustýrisfundirnir verða hildnir:

Mánaði:	**Dagur**
Februar,	týsdagin tann 27.
Mars,	mánadagin tann 26.
Apríl,	mánadagin tann 23.
Mai,	mánadagin tann 21.
Juni,	mánadagin tann 18.
Juli,	týsdagin tann 31.
August,	mánadagin tann 27.
September,	mánadagin tann 24.
Oktober,	mánadagin tann 22.
November,	mánadagin tann 5.
November,	týsdagin tann 20.
Desember,	mánadagin tann 17.

Allir fundir byrja kl. 19.

Íbúðir/Kømur søkjast

Søkt verður eftir húsum ella kømurum til næmingar á almanna- og heilsuskúlanum á Tvøroyri.

Áhugaðir útleigarar kunnu ringja á tlf. 372480 ella 371085 mánadag til fríggjadag millum kl. 9.00-12.00 og 13.00-16.00.

Suðuroyar Kunningarstova